# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Glottar í røðu

Tað má uttan víðari ásannast, at løgmansrøðan, sum vit generelt viðgjørdu í gjár, hóast hon í støðum er lítið ítøkilig, eisini fevnir um áhugaverdar partar og sera týdningarmikil hugskot.

Ætlan samgongunnar er, at stórur partur av hækkaða íløgukarminum skal gagnnýtast á slíkan hátt, at eisini annar íløgupeningur fæst til vega. Hetta er eins skilagott og tað er sjálvsagt. Víst verður til tær mongu verkætlanir innan mentan og ítrótt, sum í áravís hava ligið á tekniborðunum ella á almennum skrivstovum og bíða eftir politiskum avgerðum og játtanum. Her er mangt í at velja: mentanarstovnarnir hava flestallir út av lagi vánaligar hølisumstøður. Verst fyri eru uttan iva mentanarsøvnini, har okkara ómissandi mentanararvur fúnar ella er væl og virðiliga fjaldur burtur fyri eygum almenningsins. Arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum eru hareftir.

Landsstýrið eigur tí at nýta høvi til eitt nú at byggja felags hús til Fornminnissavnið, Landsskjalasavnið og Landsbókasavnið. Vit kunnu eisini nevna Tjóðpallin, sum er húsvillur og bert takkað verið vælvild frá Tórshavnar býráði ikki liggur úti á berajóli. Tann viðferð, sum landsmyndugleikarnir geva hesum mentanarstovnum er einki minni enn landaskomm, sum nú kann bøtast. Hesar uppgávur kunnu ivaleyst verða loystar í tøttum samstarvi við Tórshavnar býráð, sum á flestøllum økjum, ikki minst mentanarøkinum, er ljósár frammanfyri landsstýrið. Í hesum viðfeingi kann verða hóskandi at minna á nýggja kringvarpshúsið, sum ABC 1 lovaði Føroya fólki. Hetta lyftið, sum varð givið við fimtiára hald Kringvarpsins eigur at verða hildið, samstundis sum hesin mentanarstovnur eigur at verða skipaður sum ein veruligur public service stovnur, so orkan verður nýtt til annað og betri enn at kappast við privatu miðlarnar um lýsingamarkanðin.

Tað er rætt og gott, at samgongan ætlar at lanta landið byggja ítróttahøll á Sandoynni. Hetta mál kann valla loysast á annan hátt, men sjálvsagt eiga kommunurnar at vera við m.a. til at tryggja raksturin. Ein ítróttahøll fer at hava stóran týdning fyri trivnaðin á í Sandoynni og fer at gera sít til, at fólkið trívist og støðast. Um lokal mentanarhús og um ítróttarverkætlanir, sum løgmaður eisini hevur í huga, er bert alt gott at siga og her eigur at verða farið til verka sum skjótast og at gera hetta í samstarvi við kommunurnar. Tað er tó eingin orsøk til at byggja ungdóms- og bygdahús á hvørjum tanga. Sum undirstøðukervið hevur ment seg, er nóg mikið við fáum men góðum húsum, ið skulu kunna nýtast til øll endamál innan mentan og ítrótt. Í hesum sama høpi eigur landsstadion at verða projekterað og byggt, soleiðis, at vit kunnu hýsa Oyggjaleikunum og stórum altjóða tiltøkum.

Vit hava her víst á nakrar glottar og tikið fram nøkur brot, sum snúgva seg um sera aktuel mál, har vit halda løgmann hava havt heppna hond. Aðrir glottar eru, meðan tað sama ikki kann sigast um uppaftur aðrar partar av røðuni, sum vit venda aftur til í næstum.

**Sosialurin**

## Mentan og vøkstur



**HELENA DAM Á NEYSTABØ**
landsstýriskvinna í mentamálum

Løgmansrøðan er, sum vera man, ein samandráttur av teimum mongu málsøkjunum, sum landsstýrið og landsstýrisfólkini arbeiða við. Tað er rímiligt, at ólavsøkupakkin og tey mongu tiltøk, ið samgongan hevur sett sær fyri at fremja til tess at møta fíggjar- og búskaparkreppuni, fylla nógv í ólavsøkurøðu løgmans, og at tað tí eru mál, ið rúm ikki hevur verið fyri í røðuni. Eitt av teimum er mentanarøkið.

Eg fari tí at loyva mær at greiða Føroya fólki frá nøkrum av teimum ætlanum, ið eg, sum landsstýriskvinna í mentamálum, boðaði løgmanni frá, kundu verið umrødd í løgmansrøðuni. Mál, sum hava høga raðfesting í árinum sum kemur og árunum sum koma.

Í Føroyum hava vit eitt ríkt tilfeingi – fólkið, mentanina og samleikan. Hetta eru grundarsteinar, tá vit vilja menna kreativa og skapandi vinnu. Megna vit at skipa okkum á rættan hátt, kann mentan og nýhugsan gerast okkara virðismiklasta tilfeingi – mentanarliga eins og búskaparliga. Eitt av endamálunum við mentanarpolitikkinum er at skapa karmar, ið menna kreativar førleikar, og sum frá líður eisini kreativar vinnunur.

Landsstýrið ætlar at taka upp samstarv við okkara virkna mentanarlív við tí endamáli í felag at orða eina virkisætlan, ið umframt at menna mentanarkarmarnar, vísir á, hvussu til ber at menna mentan til vinnu. Tann vøkstur, ið okkum tørvar í løtuni, skal spretta úr øðrvísi gagnnýtslu av tilfeinginum. Farið verður undir hetta samstarv í heyst.

**Mentanarliga undirstøðukervið**
Somuleiðis skal ein ætlan orðast, hvussu vit bøta um mentanarliga undirstøðukervið kring landið. Hugsað verður um søvn, sjónleika- og tónleikahús, mentanarhús og aðrar týðandi íløgur á mentanar- og ítróttarøkinum.

Vert er at geva gætur, at stuðulin til mentanina er virksemisskapandi. Sjáldsama nógv arbeiða sjálvboðið og ólønt við stórum verkætlanum á mentanarøkinum. Fólk skriva, yrkja, skapa tónleik, sjónleik, menna sniðgeving, listahandverk, matlist, byggja bátar og menna ferðavinnutilboð o.s.fr.. Alt hetta er við til at skapa arbeiði og vøkstur innan kreativu vinnugreinar okkara.

**Mentanargrunnurin**
Við at vaksa nakað um tann stuðulin, sum Mentanargrunnurin veitir, og sum verður veittur til at menna mentanarliga undirstøðukervið um alt landið, skapa vit hópin av virksemi í mentanarligu høvuðsvinnuni, men eisini í hjávinnum sum t.d. grafisku vinnuni, KT-vinnuni, prentsmiðjuvinnuni, byggivinnuni og ferðavinnuni. Miðað verður eftir at styrkja um bæði fíggjarliga og fyrisitingarliga partin av Mentanargrunni landsins, og neyðug lógarbroyting verður løgd fyri tingið.

Tað er umráðandi, at okkara listafólk, rithøvundar og tónleikarar fáa møguleika fyri at arbeiða við sínari list, og at listin sleppur at bjóða av, at revsa, at orða nýggjar hugmyndir og at virka frælst. Tað er altavgerðandi fyri okkara førleika at flyta okkum.

Leiklistin í Føroyum blómar, hóast umstøðurnar ikki eru tær bestu. Sum líður í at bøta um viðurskiftini er ein arbeiðsbólkur settur at gera tilmæli um stutt- og langtíðarætlan við atliti at hølisumstøðunum, og hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í heyst.

**Kringvarpið**
Kringvarpið er ein týðandi mentanarberi í føroyska samfelagnum. Í komandi tingsetu verður Føroya fyrsti public service-sáttmáli lagdur fyri tingið til aðalorðaskiftis. Sáttmálin skal m.a. áseta, hvørjar skyldur Kringvarpið hevur mótvegis borgarunum aftur fyri kringvarpsgjaldið, og endalig avgerð skal takast um fíggingarleist Kringvarpsins eins og leiðslubygnað Kringvarpsins.

Eisini verður álitið um málmørk lagt til aðalorðaskiftis. Fólksins samleiki endurspeglast í móðurmálinum, ið sum fremsti samskiftismiðil skal tryggja, at málini, sum vit seta okkum, verða rokkin á ein fólkaræðisligan hátt.

**Mentanin og ítrótturin ganga á odda**
Eins og føroysk mentafólk, ganga ítróttarfólkini á odda, tá ræður um at seta Føroyar á heimskortið. Hetta bera framúr góðu úrslitini í altjóða kappingum boð um. Nógv átøk kunnu gerast fyri at betra um umstøðurnar hjá føroyskum ítrótti. Ein raðfest útbyggingarætlan fyri ítrótttarøkið skal orðast, løggáva skal samtykkjast um bygging av ítróttar- og mentanaranleggum, og støða skal takast til, um Føroyar skulu søkja um at hýsa Oyggjaleikunum í 2017. Á hesum øki, eins og á so mongum økjum innan mentan og list, er tað ómetaliga umráðandi, at tey sjálvbodnu í mentanarlívinum, landsstovnar, vinnan, land og kommunur hava eitt felags stev.

Miðað verður eftir at koma á mál við lógávuarbeiðinum í sambandi við, at fólkakirkjan er yvirtikin, og stórur dentur verður lagdur á at byggja upp eitt haldgott og virðiligt samstarv millum kirkjuliga og politiska myndugleikan.

Hetta eru nøkur av teimum málum, ið eg ynski at greiða løgtinginum frá í sambandi við løgmansrøðuni, ásannandi at eitt ríkt mentanarlív er ein fyritreyt fyri trivnaði og viljanum til at taka tøk í felag.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.